## Sankta Frans skúli 75 ár

Í ár eru liðin 75 ár síðani franciskanarsystrarnar bygdu tann stóra skúlabygningin við Varðagøtu í Havn, og sum varð vígdur 8. desember 1933. Í hesum sambandi fer skúlin at hátíðarhalda dagin, saman við verandi næmingum og fyri teimum, sum á einhvønn hátt hava ella hava havt nakað við skúlan at gera hesi árini, sum til dømis næmingar, lærarar og onnur. Frá kl. 18 verður opin skúli, har byrjað verður við felagssangi, røðum og framførslum. Hildið verður á til kl. 21.



## Ferja verður savn

Ferjan ”Sjælland”, sum í síni tíð sigldi um Stórabelti, skal nú brúkast til savn. Ferjan bleiv seld til Bretlands og er nú matstovuskip í havnarbýnum Barrow in Funess, men nú skal hon aftur til Danmarkar. Fyns Amts Avis skrivar, at ”Sjælland” skal umbyggjast til savn, og tá arbeiðið ert liðugt, skal skipið liggja við bryggju mitt í Keypmannahavn. Hetta er ikki fyrstu ferð, at ætlanir hava verið um at gera eina av stórabeltsferjunum til savn. Sama ætlan var við ferjuni ”Kong Frederik IX”, men hon endaði sum gamalt jarn á einari strond í India.

# Føroyingar mugu



*Paul Watson avmyndaður fyri fýra døgum síðani í Brisbane í Australia. Undir liðini á honum stendur amerikanska sjónleikarinnan Daryl Hannah, sum er við umborð á Sea Shepherd skipinum Steve Irwin. Tey eru á veg í hernað ímóti japanskum hvalaveiðimonnum*
*Mynd: Polfoto*



*Ábyrgdarblaðstjórin á Sosialinum var eisini í 1985 á staðnum, tá hann fór umborð á Sea Shepherd fyri at gera interview við Paul Watson*

## Stríddust við løgregluna

**Stórur dramatikkur var í 1986, tá samanbrestir vóru millum Sea Shepherd fólk og løgregluna**

SEA SHEPHERD
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Paul Watson og hansara fólk hava tríggjar ferðir verið í Føroyum.

Fyrstu ferð var í 1985, tá Watson kom sum ein rímiliga ókendur maður til Føroya. Eingin dramatikkur var í hansara vitjan, men hann fekk høvi at finnast at føroyingum fyri at drepa grind.

Bæði skúlanæmingar og fjølmiðlar vitjaðu umborð hjá Paul Watson, sum segði frá sínum hugsanum.

Árið eftir var lívið eitt heilt annað. Tá gjørdist tað til ógvusligar samanbrestir millum fólk hjá Paul Watson og løgregluna. Skipið hjá Watson varð jagstrað í føroyskum sjógvi, og fólk vóru handtikin.

Um tað vóru hesar ógvusligu hendingar, sum fekk Watson at stúra, er ikki gott at vita, men í øllum førum gingu tað 14 ár, áðrenn Watson vitjaði aftur.

Ta ferðina var ikki tann stóri dramatikkurin, men løgreglan royndi at sleppa umborð á skipið hjá Watson fyri at handa honum eina bót eftir hendingarnar í 1986.

Tá varð Watson eisini vístur úr Føroyum, og hann hevur ikki loyvi at koma at landi í Føroyum aftur.

Nú hóttir Paul Watson so aftur við at seta kósina ímóti Føroyum.

**- Um føroyingar halda fram at eta grind, so mugu teir verða skítbýttir. Eingin fer at eta eitur, uttan tú ynskir at doyggja, sigur Paul Watson, sum hevur verið fremsti stríðsmaðurin ímóti grindadrápinum. Hann hóttir við at koma aftur til Føroya at stríðast, um føroyingar ikki gevast við grindadrápinum**

PAUL WATSON
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Hann hevur verið tann ídnasti stríðsmaðurin ímóti føroyska grindadrápinum. Hann hevur verið í hørðum samanbrestum við myndugleikarnar og var landsforvístur eftir ágang ímóti føroyingum fyri 20 árum síðani.

Og hóast hann ikki hevur verið Føroyum í nógv ár, fylgir Paul Watso, sum er oddamaður í umhvørvisfelagsskapinum Sea Shepherd, framvegis væl við gongdini í føroyska grindadrápinum.